Altjóða handikappdagur 3. december:

Skilja ikki støðuna hjá brekaðum

Í skrivi, sent Føroya Løgtingi til umrøðu handikappdagin, sigur MBF - rørslubólkurin milum annað, at umstøðurnar hjá brekaðum í Føroyum, kunnu samanberast við tær hjá brekaðum í Kenya, og at ásannast má, at landsins kosnu menn og kvinnur skilja ikki støðuna hjá brekaðum.

DAGFINN OLSEN

Í skrivinum til Føroya Løgting, leggur MBF-rørslubólkurin upp til, at tingmenn taka umstøðurnar hjá brekaðum í Føroyum upp til umrøðu.

Skrivið, ið rættuliga gjølla nemur við umstøðurnar hjá brekaðum, gevur rættiliga tilfar og orsøk til umhugsni.

Millum annað verður sagt, at venjingarmiðstøð er eingin í Føroyum. Hetta ger, at avlamin fyri lívstíð mugu liva undir heitinum avlamispensiónistar og arbeiðsleys og hetta er ikki mennandi fyri viðkomandi.

Í Føroyum finst bert ein skerd heimarøktarskipan og/ella fyribilsloysnir. Sostatt verður brúkarin við sviðusoð, verður sagt í skrivinum.

Atkomumøguleikar

Heldur ikki eru góðir atkomumøguleikar, hvørki á almennum stovnum ella á Strandfaraskipum Landsins. Niðurstøðan er, at rørslutarnað eru slept uppá fjall. Hetta hóast røslutarnað eru ikki bara brekað, men eisini við til at velja lansins kosnu menn og kvinnur.

Eru rampur, lyftir og parkeringsbásar ov dýr fyri samfelagið?, spyr MBF-bólkurin.

MBF-bólkurin heldur tað vera ynskiligt, at grein 17 í forsorgarlógini varð víðkað so, at hon líktist donsku bistandslógini, soleiðis, at tann brekaði sjálvur fær størri ávirkan á egnar umstøður, ístaðin sum nú, at Almannastovan metir um tørvin hjá tí einstaka.

Eisini verður mett, at skipanin í dag virkar við ov skiftandi arbeiðsmegi. Ymsir hjálparar koma at vaska tí brekaða ella at vaska inni hjá viðkomandi. Sostatt vita hesi heldur ikki tørvin, eitt nú hvussu viðkomandi skal takast upp úr seingini ella hvussu armurin skal liggja, tá farið verður til songar.

Vit og skil

Í skrivinum verður mint á, at lammað fólk hava eins gott vit og skil, sum øll onnur. Tey eru ikki annað »ættarslag« av fólki.

Mett verður, at ein sonevnd handikapp-hjálparskipan ikki er so nógv dýrari, enn eitt røktarheimspláss.

Av tí, at neyðug hjálp ikki fæst í Føroyum, hava føroyingar leitað sær venjing, heilsubót uttanlands fyri egna rokning.

Føroyingar fáa, tó bert eftir umfatandi skaða, ókeypis intensiva endurvenjing í Danmark.

Niðurstøðan er, at rørslutarnað eru púra gloymd á viðgerðarøkinum og at hetta átti ikki komið fyri í einum vælferðarsamfelag.

Fólk koyrd úr heimnum

Landsins kosnu skilja ikki støðuna, ásannar bólkurin sambært orðaskiftið í tinginum handikappdagin 1997. Hetta kom eisini til sjóndar, tá tey, ið búgva á B74 (sinnisbrekað) vórðu tvingað úr heimunum og á psyk. deild at halda jól.

MBF-bólkurin vil m.a. hava løgtingsumboð at skilja, at lívið skal livast, hóast ein er fangi í egnum kroppi. At nakað er,ið kallast lívsvirði og at øll hava hetta fyri neyðini.

At hjálpitól og endurvenjing gevur rørslutarnaðum í grannalondum okkara góðar umstøður og arbeiðsmøguleikar.

Sum í Kenya

Bólkurin ásannar, at nógv liggur á láni og at arbeiðið hjá politikkarunum ikki er gjørt til lítar innan sosialpolitikk.

Ikki eingang í 80'unum, tá lokið á landskassanum ikki fekst aftur vegna peningayvirflóð, hendi nakað á økinum viðvíkjandi rørslutarnaðum, sigur bólkurin í skrivinum.

MBF-rørslubólkurin slær fast, at umstøðurnar hjá brekaðum í Føroyum kunnu samanberast við umstøðurnar hjá brekaðum í Kenya.

Í Føroyum verður altíð tann bíligasta og forsvarligasta loysnin funnin, verður sagt í skrivinum til Føroya Løgting.

Í skrivinum verða m.a hesir spurningar settir:

Um Føroya Løgting og og Føroya Landstýrið hava tikið hædd fyri á komandi fíggjarlógum, at eitt nú brekað og pensiónistar ikki fáa neyðuga røkt og at bólkurin av rørslutarnaðum økist. Um landsins myndugleikar ikki eiga at ganga fremstir, tá um ræður at broyta hugburð og fyri hvørjum skal vælferðarsamfelagið varðveitast?

MBF-rørslubólkurin ger vart við, at skrivið á ongan hátt skal metast sum álop á starvsfólk Almannastovunnar.

Bólkurin vónar at fáa svar í tinginum altjóða handikappdagin, tann 3. december 1998.



MBF-rørslubólkurin samanber umstøðurnar hjá rørslubrekaðum í Føroyum við umstøðurnar í Kenya (Tilvildarlig mynd)

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

Nissan Primera 1.6 Player
4 hurðar, bláur, árg. 95, 57.000 km.
110.000

Nissan Primera 2.0 LX
4 hurðar, bláur, árg. 97, 14.000 km.
155.000

Nissan King Cab 4x4 TD
2 hurðar, hvítur, árg. 95, 29.000 km
128.000

Nissan Patrol 4.2 Hardtop DX
3 hurðar, svart/gráur, árg. 89,
65.000

Peugeot 106 XS 1.4
3 hurðar, bláur, árg. 98, 14.000 km.
105.000

Peugeot 405 1.6 GL
4 hurðar, hvítur, árg. 88, 99.000 km.
50.000

BMW 524 TD
4 hurðar, svartur, 276.000 km.
53.000

Citroen BX 1.9 Diesel
5 hurðar, Vínreyður, árg. 92, 194.000 km.
65.000

Ford Escort 1.6
3 hurðar, hvítur,
14.000

Ford Fiesta
3 hurðar, svarturr, 152.000 km.
19.000

Ford Fiesta 1.8 diesel
3 hurðar, svartur, árg. 92, 58.000 km.
54.000

Toyota Hi Ace Diesel
4 hurðar, hvítur, 127.000 km.
30.000

P/F Meinhardt Arge
Á Halsi · Box 3171 · 110 Tórshavn
Tlf. 316161

Bjartskygni at hóma í Runavík

DAGFINN OLSEN

Eitt ávíst bjartskygni tykist at vera at hóma, hyggur ein at fíggjarlógini fyri 1999, sum Runavíkar Býráð samtykti á fundi 26. november.

Ein ávísur vøkstur er bæði í rakstrar- og íløgutreiðslunum, í mun til tilsvarandi útreiðslur í 1998.

Í viðmerkingunum verður sagt, at vegna fíggjarligu umstøðurnar seinastu árini, hevur ikki verið møguligt at avseta tann pening, sum er neyðugur til ymisku økini, men við tí inntøkuvøkstri, sum nú tykist at vera, hevur býráðið hildið verið ráðiligt at avseta meira pening til viðlíkahald av kommunalum ognum, so sum skúlabygningum, vegum og havnaløgum.

Nýggj øki

Rakstrarætlanin hjá kommununi, ið annars er sett upp sum vanligt, hevur komandi ár fingið eitt nýtt rakstrarstað undir heitinum Mentanar- og ungdómsstuðul.

Til endamálið eru settar av 75.000 kr., sum vera nýttar eftir nærri reglum, ásettar av býráðnum.

Vegna økta virksemið hevur býráðið eisini hildið vera ráðiligt at avseta pening til eitt starv afturat á teknisku deild. Miðað verður ímóti at starvið verður sett sum skjótast í nýggja árinum.

Vøkstur er í íløgunum. Farnu árini hava møguleikar ikki verið at gjørt munandi íløgur, men nú ætlar býráðið at gera meira á hesum øki.

Av íløgum, sum ætlanin er at fremja komandi ár, kunnu nevnast:

1. Nýggi vegurin til havnalagið á Glyvrum, 1.0 mió. kr.
2. Umlegging av Glyvravegi (við missiónsh.), 1.0 mió. kr.
3. Víðkan av havnalagnum, 2.0 mió. kr.
4. Høvuðsumvæling av Glyvra Skúla, 2.0 mió. kr.
5. Framhald av Vegnum á Líknagøtu, 0.6 mió. kr.
6. Umlegging av Leitisbrekku, 0.3 mió. kr.
7. Asfaltering av høvuðsvegnum, 1.0 mió. kr.
8. Ymsar smærri íløgur, 1.5 mió. kr.

Vøkstur

Skattaprosentið í Runavíkar Kommunu varð á fundinum sett til 20%, barnafrádráttur verður kr. 1.500,- og kirkjuskattaprosentið 0.55%.

Roknað verður við eini skattskylugari inntøku uppá 227,5 mió. kr.. ímóti 206 í 1998. Sostatt ein vøkstur uppá 10,4%.

Hóast henda vøkstur, so liggur metan býráðsins 5% lægri, enn metanin hjá Toll- og Skattstovu Føroya, ið roknar við skattskyldugari inntøku uppá 239 mió. kr.

Við einum avlopi uppá kr. 440.000,- javnvigar fíggjarætlanin við kr. 49,9 mió., ímóti kr. 42.- mió. í 1998.

Til rentur og avdráttir eru avsettar 12 mió. kr. Herav 3,8 mió. kr. til rentur og 8,2 mió .kr. til avdráttir. Herav 6 mió. kr. til eykaavdráttir.

Rakstrarútreiðslur:

	Ár 1999.	Ár 1998.
Byggibúning v.m	3,5 mill.	3,5 mill.
Kommunal virkir	3,3 "	2,7 "
Teknisk mál	4,5 "	3,7 "
Skúla- og Mentamál	5,4 "	5,2 "
Almanna- og Heilsum.	8,4 "	8,2 "
Kommunal Fyrisiting	2,9 "	2,3 "
Tilsamans	28,0 Mill.Kr.	25,6 mill.Kr.

Íløgur.

	Ár 1999.	Ár 1998.
Byggibúning	0,0	0,0
Kommunal virkir	3,1 mill.	2,0 mill.
Teknisk mál	3,7 "	1,5 "
Skúla- og Mentamál	2,2 "	0,3 "
Almanna-og Heislum.	0,0 "	0,0 "
Kommunal Fyrisit.	0,4 "	0,0 "
Tilsamans	9,4 mill.Kr.	3,8 mill.Kr.